# Bygdarráðsfundur

# Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 23.02.2026 kl. 16.30

Á fundi: Poul Laust Christiansen
Rakul Mørk
Jónfinn L. Poulsen
Jóhannes Liasson Rasmussen
Thorstein Thomsen (fyri Otto West)

Ikki møtt: Janus Thomsen
Ronni Hammer

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

1. **<u>102-10-2026: Umsókn um stuðul til tónleikatiltakið «Maitónar».</u>**
   Tiltakið, ið snýr seg um heimakonsertir í einum býlingi í Hvalba, varð hildið fyrstu ferð í fjør og verður søkt um stuðul til at endurtaka hetta í mai í ár.
   **Trivnaðarnevndin 23.02.2026:**
   Nevndin mælir til at stuðla við kr. 10.000,00 eins og undanfarna ár, treytað av, at tiltakið verður.
   **Fíggjarnevndin 23.02.2026:**
   Samtykt varð einmælt at mæla til at stuðla við kr. 10.000,00, treytað av, at tiltakið verður hildið.
   **<u>Avgerð</u>:**
   Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælunum hjá nevndunum.

2. **<u>102-12-2026: Umsókn um stuðul frá Trivnaðargrunninum fyri Sjúklingahotellið Tórshavn</u>.**
   Trivnaðargrunnurin skipar fyri ymiskum útferðum fyri sjúklingum og avvarðandi, eins og koyrt verður til tiltøk í Keypmannahavn. Alt hetta er sjálvboðið arbeiði og ber bert til, um tey framhaldandi fáa stuðul úr Føroyum.
   **Fíggjarnevndin 23.02.2026:**
   Samtykt varð einmælt at mæla til ikki at stuðla hesum.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt, eftir tilmæli frá Thorstein Thomsen, at stuðla við kr. 5.000,00.

3. **<u>102-14-2026: Umsókn um sundurbýti – matr.nr. 403a, Sandvík</u>.**
   Búnaðarstovan søkir vegna eigaran um at sundurbýta 2 lutir av ognini matr. nr. 403a í Sandvík, ávikavist 2.022 m2 og 1.290 m2 tinglýst vídd, íalt 3.312 m2, sum í byggisamtyktini eru útlagdir sum landbúnaðarøki.

**Avgerð:**
Samtykt varð einmælt at viðmæla umsóknini um sundurbýti.

4. **102-78-2025: Umsókn um byggiloyvi til neyst við íbúð á matr. nr. 260/261, Hvalba.**
Søkt verður um byggiloyvi til neyst við íbúð á Bíargarði 15 og 17.
**Byggimálsviðgerð:**
Byggimálsviðgerin mælir til at ganga umsóknini á møti, treytað av, at bygt verður sambært nýggjastu tekningunum, innsendar tann 21.01.2026.
Málið hevur verið til hoyring og er viðgjørt av:
- Náttúrufriðingarnevndini fyri Suðuroyar Sýslu / Yvirfriðingarnevndini
- Landsverk

**Tekniska nevnd 19.02.2026:**
Nevndin mælir til, at byggiloyvi verður givið og loyvir frávik á byggistignum.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælunum hjá nevndini og byggimálsviðgeranum og geva byggiloyvi sambært umsókn, givnum upplýsingum og tekningum, treytað av, at byggingin verður framd í samsvari við hjálagda byggiloyvi og treytum annars sambært BK17.

5. **102-63-2025: Avtala um burturbeining av grindaleivdum.**
Tekniska-, Vega/Havna- og Fíggjarnevndin hava tann 27.10.2025 samtykt eitt árligt gjald fyri at loyva Vágs Kommunu at beina burtur grindaleivdir vestur av Norðbergseiði. Vágs Kommuna hevur samtykt og undirskrivað sáttmála hesum viðvíkjandi.
**Tekniska nevnd 19.02.2026:**
Nevndin mælir til, at sáttmálin verður undirskrivaður.
**Fíggjarnevndin 23.02.2026:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at góðkenna og undirskriva fyriliggjandi sáttmála.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

6. **102-13-2026: Skriv viðvíkjandi felags integratiónssamskipara.**
Sambært Løgtingslóg nr. 146 frá 20. desember 2024 skal hvør kommuna í seinasta lagi 1. juli 2026 hava integratiónssamskipara. Í hesum sambandi hava kommunurnar í syðru helvt av Suðuroy sent kommununum í norðaru helvt innbjóðing til samstarv um felags integratiónssamskipara fyri alla oynna.
**Fíggjarnevndin 23.02.2026:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at verða við í hesum samstarvi, treytað av, at allar kommunurnar í oynni eru við.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

**7. Ikki alment mál.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 17.35

Poul Laust Christiansen Rakul Mørk Jónfinn L. Poulsen

Jóhannes Liasson Rasmussen Thorstein Thomsen